




Puntur nr.13

# Ferðamál: Listarliga London

**Í sambandi við, at Sosialurin í hesi vikuni vitjar bretska høvuðsstaðin London, setur Torfinnur Jákupsson, ið er lesandi í London, í hesi greinini fokus á kenda listaskálan Tate Modern**

LONDON
*Torfinnur Jákupsson*

Ímillum mongu støðini, ið eru verd at vitja sum ferðandi føroyingur í London, er listaskálin Tate Modern.

Saman við trimum øðrum listaskálum runt um í Onglandi er Tate Modern partur av tí samlaða bretska Tate Gallery. Tate Modern hýsir nútímans altjóða listini.

Síðani Tate Modern lat upp í mai í 2000, hevur listaskálin verið eitt sera væl umtókt ferðamál fyri bæði London-íbúgvar og onnur. Tað kostar ikki at sleppa inn í Tate Modern, og tað er eitt pluss. Savnið er somuleiðis stórt og áhugavert.

Bygningurin sjálvur er í sjey hæddum og hevur m.a. eisini matstovu á ovastu hædd, har til ber at hugna sær við einum frálíkum útsýni út yvir London.

Listaskálin er opin sunnudag til hósdag ímillum kl. 10.00 og 18.00, og fríggjadag og leygardag frá kl. 10.00 til kl. 22.00.

The Turbine Hall á niðastu hædd er størsti parturin av listaskálanum. Henda høllin hýsir størstu framsýningunum, og er høllin 3.400 fermetrar til støddar.

The Turbine Hall verður nýtt til at sýna fram serlig verk av samtíðarlist. Hetta er ímillum oktobur og mars mánaða hvørt ár.

Hesar framsýningar skuldu av fyrstan tíð, síðani Tate Modern lat upp, bert vara fyrstu fimm árini, men hava tær verið so mikið væl umtiknar millum tey vitjandi, at tær fara at halda fram í tvey ár afturat; til og við 2008. Hjá listaáhugaðum føroyingum eru hesar verdar at vitja.

Kann m.a. sjálvur nevna, at eg fyrr í ár var til stóru framsýningina í hesi høllini av listarverkinum "Embankment" hjá Rachel Whiteread. Henda listarliga uppliving fer ikki skjótt í gloymibókina.

Tað er ikki ein og hvør, ið megnar at gera listarverk, ið fevna um 3.400 fermetrar, og Whiteread bíðaði eisini í hálvt ár, áðrenn hon takkaði ja til at luttaka í Tate Modern.

Motivið helt eg tó vera heldur løgið. Seinna partin av september mánaða í fjør og inntil miðjan oktobur varð hennara verk sett upp. Verkið fevndi um fjúrtan túsund hvítar kassar, ið vórðu lagaðir í ymsar bygnaðir í høllini.

Í síni lýsing av verkinum hevur Whiteread m.a. nevnt síðstu senuna í filminum "Citizen Kane" fyri at vísa á, hvat hon hugsaði um, tá hon gjørdi verkið. Hon nevndi somuleiðis deyða móðir sína, eins og eitt tíðarskeið í lívi hennara, ið snúði seg nógv um at pakka saman og at flyta víðari.

Sjálvur kendi eg tað sum at standa og hyggja niður í eina stóra heilsølugoymslu, tá eg stóð omanfyri verkinum á fyrstu hædd. Tó var upplivingin heilt øðrvísi, tá ein gekk niðri ímillum kassarnar.

Listarligu upplivingarnar eru skiftandi og persónligar, men upplivingin at vitja Tate Modern er ein, sum tú minnist sum føroyingur.

Ein av bestu hættunum at ferðast til Tate Modern listaskálan er umvegis London Millennium Bridge, ið gongur tvørtur um Thames ánna. Hetta er ein fótgangarabrúgv, og er hon eisini verd at spáka sær ein túr um sum føroyingur. Ikki hava vit nógvar brýr í Føroyum, og er útsýnið á Millennium Bridge sera øðrvísi, enn hetta er á brúnni um Streymin herheima.



*Framsýningin av verkinum "Embankment" hjá Rachel Whiteread fevndi um fjúrtan túsund hvítar kassar, ið vóru lagaðir í ymsar bygnaðir. Hølið, ið verkið varð sýnt fram í, er 3.400 fermetrar til støddar*



*Millennium Bridge gongur tvørtur um kendu Thames ánna og endar beint við listaskálan Tate Modern. Útsýnið á Millennium Bridge má sigast at vera sera øðrvísi, enn hetta er á brúnni um Streymin herheima*




